# Dýrari sethús kring alla oynna

**Suðuroy:** Seinastu tvey árini er sethúsaprísurin í Suðuroynni farin uppeftir, bæði tá talan er um at byggja nýggj sethús, og eisini tá eldri sethús verða keypt. Hetta eru Eik, Føroya Banki og Suðuroyar Sparikassi samdir um, skrivar Suðurrás. Tá talan er um at byggja nýggj sethús, so skal roknast við, at hesi kosta millum 1,3 og 1,4 milliónir, og tá er grundstykkið ikki við í prísinum. Grundstykkjaprísurin er ógvuliga ymiskur í oynni, alt eftir, hvar keypt verður. Tá talan er um keyp av eldri sethúsum, so er prísurin stýrdur av, hvar í oynni húsini eru, og hvørjum standi tey eru í. Eik hevði 1. ársfjórðing í 2006 ein miðalprís upp á 545.500 krónur, meðan miðalprísurin 4. ársfjórðing í 2007 var uppi á 753.775 kr. Suðuroyar Sparikassi er, eins og Eik og Føroya Banki, heldur ikki í iva um, at sethúsaprísirnir eru uppgangandi á teimum størru plássunum í Suðuroynni.



# Einki hús á sølulista

**Suðuroy: -** Suðuroyggin er ein relativt tunnur sethúsamarknaður, sigur Suðuroyar Sparikassi í eini viðmerking til støðuna innan sethúsamarknaðin í oynni. Av hesum sama er datagrundarlagið heldur óvist og skal tí takast við fyrivarni. Eik, Føroya Banki og Suðuroyar Sparikassi upplýsa fyri Suðuroyarportalinum, at teir ikki hava nakað hús á sølulista í Suðuroy í løtuni.

# Góð skotsmál frá Moody's

**Moody's Investors Service sigur í eini frágreiðing á heimasíðu síni, at føroyska ratingin er grundað á góð fíggjarlig úrslit síðani 1995, nøktandi peningagoymslu, rímiliga og minkandi skuld og minkandi rentuútreiðslur**

RATING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Hóast stóru avbjóðingarnar at stýra einum búskapi, sum er tengdur at fiskaríi, hava Føroyar fingið munadygg fíggjarlig úrslit seinastu tíggju árini. Føroyar høvdu ein búskaparvøkstur upp á átta prosent í 2006, og roknað verður við líknandi úrsliti í 2007. Varligar fíggjarætlanir, greið viðurskifti við Danmark við atliti at øktum frælsi og væntandi sjálvstýri, umframt økt ansni og eftirlit, hava stabiliserað búskap landsstýrisins, sigur Thomas Ameta, varastjóri og Senior Credit Officeer, og leiðandi analytikarin fyri Føroyar.

Í ratingini hevur Moody's tikið serligt atlit til, at Føroyar eru so tætt tengdar at fiskivinnuni, serliga til útflutnings. Búskaparligur óstøðuleiki og ávirkanin á skattainntøkurnar eru tí mettar at vera munandi hægri enn í Danmark.

- Føroyska landsstýrið letur ikki longur stuðul til vinnulívið, og veðhaldini eru slept, nakað, sum annars førdi til fíggjarliga kreppu tíðliga í 90-unum. Føroyar eru nú nógv meiri mótstøðuførar, tí búskapurin sum heild, og serstakliga fiskivinnan, gerast alt meiri fjølbroytt, sigur hjálparanalytikarin, Mattias Frithiof.

## Ratingin tengd at Danmark

Sambært Moody's verður ratingin undirbygd av góðu møguleikunum hjá landsstýrinum at økja um inntøkurnar við hægri skatti og avgjøldum, og at halda aftur í útreiðslunum. Hetta speglast aftur í ríkisfelagsskapinum við Danmark og teirri ríkisveiting, sum landið fær fyri at umsita málsøki hjá ríkisfelagsskapinum, og at føroysku bankarnir eru undirlagdir danska fíggjareftirlitinum.

Aa2 ratingin er eisini tengd at, at tað er ógvuliga sannlíkt, at Danmark (ratað Aaa og stabilt) fer at taka um endan til tess at fyribyrgja einum skrædli í føroyska búskapinum. Væntanin um stuðul byggir á verandi viðurskifti við Danmark, lítið hugsandi broyting í hesum viðurskiftum í nærmastu framtíð, umframt søguligum donskum stuðli til oyggjarnar.

Føroyar eru eitt sjálvstýrandi øki innan ríkisfelagsskapin. Tað er eitt oyggjasamfelag við 18 oyggjum í Norðuratlantshavi, við Stóra Bretlandi og Íslandi sum nærmastu grannum. Livistøðið hjá teimum 48.350 íbúgvunum er høgt, men kortini eitt sindur lægri enn hjá hinum Norðanlondunum, skrivar Moody's á heimasíðu síni.

Men hesum seinasta reglubrotinum munnu fleiri hava hug at muta ímóti.



*Vaksandi meðalaldur og ófullfíggjað pensjónskipan er nakað, sum dregur niður í ratingini hjá Moody's*

*Tilvildarlig mynd*

# Stórt rúm fyri betran

**Í vektingini av fyrimunum og vansum sigur Moody's millum annað, at ein støðugt vaksandi meðalaldur og ein ófullfíggjað pensjónsskipan draga niður saman við skjótt vaksandi negativari handilsjavnvág**

RATING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tá tað í gjár kom fram, at Føroyar vórðu rataðar á einum triðja plássi, var samfelda metanin, at hetta er sera nøktandi, og tá hugsað verður um, at ratinglistin gongur frá 1 (sum er tað besta) til 21, og ljóðar hetta veruliga gott.

Hinvegin er tað ein sannroynd, at tey lond, sum vit fegin vilja meta okkum saman við, nevniliga hini Norðanlondini, eru øll ratað Aaa, sum er hægsta rating, sum verður givin.

Í grundgevingini fyri, at Føroyar verða rataðar Aa2, sigur Moody's, at fyrimunirnir millum annað eru:

- Menningin av Føroyum sum ein rík ídnaðartjóð, grundað á fiskiskap og fiskiídnað
- Sjálvstýrandi frælsi at áseta skatt og avgjøld, stýring av útreiðslunum og nøktandi peningagoymslu
- Góð fíggjarlig úrslit seinastu árini
- Rímilig og alsamt minkandi skuld
- Støðug viðurskifti við Danmark og skipaða gongd fram móti størri frælsi og møguligum sjálvstýri
- Stórar goymslur at standa ímóti søguligum viðbrekni av búskaparligum og stjórnarligum inntøkum, og fíggjarliga orku at syrgja fyri pensjónum til ein alsamt vaksandi meðalaldri.

## Vansar

Tað, sum sambært Moody's dregur niður í Føroysku metingini, er fylgjandi:

- Viðbrekni í fiskivinnuni, sum er sárbær mótvegis stórum útsvingum í bæði prísi og fiskinøgd, eins væl og munandi avbjóðingum í stýringini av fiskiveiðini. Hetta verður tó nakað lættað av øktum fjølbroytni innan fiskivinnuna og í búskapinum sum heild.
- Handilsjavnin er øktur munandi skeiva vegin og vil gerast enn verri, um fiskiskapurin, sum umboðar næstan allan útflutningin, minkar
- Roknskaparliga skipan landsins, íroknað eftirlit og stýring av kommununum, sum ikki er eins umfatandi og í hinum Norðanlondunum.
- Møguligt sjálvstýri hevur til tíðir verið eitt viðbreki politiskt evni; um ikki væl verður stýrt, kemur ríkisveitingin í vanda.
- Alsamt vaksandi meðalaldur og ein ófullfíggjað pensjónsskipan

Moody's ger sær eisini sínar metingar um útlitini fyri, at Føroyar kunnu fara upp ella niður á ratinglistanum. Í frágreiðingini sigur Moody's:

»Útlitini fyri Aa2 ratingini hjá Føroyum eru stabil, vísandi til stabilan búskap og fíggjarligari stýring av ábyrgdunum hjá heimastýrinum og skipaðu viðurskiftunum við Danmark við atliti at størri frælsi og møguligum sjálvstýri«.

Síðani nevnir frágreiðingin, hvat skal til, fyri at Føroyar grulva upp á listanum:

»Størri búskaparligt fjølbroytni, sum hevði skapt eitt størri BTÚ og landskassainntøkur, kundi ført til eina uppgradering. Moody's roknar tó ikki við munandi fjølbroytni í nærmastu framtíð, uttan so, at olja verður funnin og inntøkurnar harfrá verður stýrdar upp á longri sikt«

Men tað eru eisini viðurskifti, sum kunnu føra til eitt fall í ratingini:

»Ratingin kann koma undir trýst, um landsstýrið linkar fíggjarligu stýringina ella um eitt munandi fall í búskapinum kemur fyri, serliga um tað hendir av umhvørvisligum ella bygnaðarligum broytingum í fiskivinnuni. Bráræðsnar politiskar avgerðir, tiknar antin í Føroyum ella í Danmark, kunnu hava avgerandi ávirkan á møguleikarnar hjá Føroyum, tó at slíkar avgerðir tykjast ósannlíkar«.

Tað eru sostatt møguleikar fyri, at Føroyar bæði kunnu fara upp og niður á ratinglistanum, men mest sannlíkt fara vit at halda plássið, tá rating aftur fer fram um hálvtannað ella tvey ár.